# Íslendski aðalkonsulin farin til arbeiðis

**Í dag var fyrsti veruligi arbeiðsdagurin hjá íslendska aðalkonsulinum í Fútastovu eftir móttøkuna í Norðurlandahúsinum í gjár**

ALTJÓÐA UMBOÐ
*Kári Mikkelsen*
karim@sosialurin.fo

67 ára gamli Eiður Guðnason hevði í dag sín fyrsta arbeiðsdag sum íslendsku aðalkonsul í Føroyum. Í gjár var móttøka í Norðurlandahúsinum, og í dag byrjaði vanligi arbeiðsdagurin í Fútastovu, sum komandi árini skal húsa íslendska aðalkonsulatinum.

Dagurin í dag hevur verið meiri merktur av at fáa tey praktisku tingini at virka, heldur enn stórum hugsjónum millum londini bæði.

- Konan og eg vita, hvar vit skulu búgva, men áðrenn vit kunnu flyta inn, skulu húsini setast í stand, og tað fer helst at taka einar tveir mánaðir, sigur Eiður Guðnason, sum eisini nýtti fyrsta dagin til at fara í bankan og at vitja løgmann úti í Tinganesi.

Afturat sær hevur íslendski aðalkonsulin ein skrivara, sum er ein íslendsk kvinna, ið hevur búð í Føroyum í 10 ár.

- Vit hava havt nokk at gjørt og hava fingið nógvar heilsanir við blómum og gávum. Upplatingin hevur hevur eisini fingið stóran ans í Íslandi, og bæði sjónvarp og aðrir íslendskir fjølmiðlar hava verið á vitjan, sigur Eiður Guðnason, ið sær sær tað sum sína størstu uppgávu at knýta bondini millum Føroyar og Ísland uppaftur tættari.

- Áhugin fyri Føroyum í Íslandi er stórur, og tað verður sjálvandi ein týdningarmikil uppgáva hjá mær at fremja hetta samstarvið.

Fyri trimum vikum síðani, tá Eiður Guðnason kom fyrstu ferð at skoða viðurskiftini í Føroyum, segði hann, at tað finnast valla nøkur øki, har føroyingar og íslendingar ikki kunnu samstarva. Til dømis innan handil, ídnað, heilsu og ikki minst á mentunnarøkinum.



*Eftir hátíðarhaldið í Norðurlandahúsinum í gjár varð íslendska flaggið vundið í húnarhátt á Fútastovu, sum nú er karmur um diplomatiska virksemi Íslands í Føroyum*



*Fyrstu tveir mánaðirnar mugu íslendski aðalkonsulin og kona hansara búgva á hotelli, til húsini í Havn, har tey skulu búgva, eru sett í stand*



*Boðið varð til búgvið borð í Norðurlandahúsinum*



*Baksíðuteknarin á Sosialinum, Óli P, hevur sín máta at síggja tingini uppá... Í sambandi við orrustuna sum var um føroysku sendistovuna - ella umboðsstovuna - í Reykjavík hevði hann eina tekning av nøkrum av høvuðsaktørunum, løgmanni, Poul Mohr, Høgna Hoydal og Eiður Guðnaston. Sosialurin setti litløgdu tekningina í glas og rammu handaði teimum hana sum gávu*